# Stjóri til Framtaksgrunn Føroya

Framtaksgrunnur Føroya søkir stjóra til at fyriskipa og mynda dagligu lei›slu grunnsins.

## Starvi›

Saman vi› nevndini, fær stjórin ábyrgd av dagliga rakstrinum av Framtaksgrunni Føroya. Grunnurin er vinnurekandi og íløgur ver›a solei›is mettar út frá handilsligum grundreglum. Eftir hesi a›alreglu, skal stjórin meta um n‡ggjar verkætlanir og eisini hava virknan lut í útinnan av n‡ggju strategi grunnsins, har talan er um at lata vitan saman vi› fígging.

## Høvu›suppgávur

· Finna fram og meta um n‡ggjar verkætlanir.
· Fyrireika tilmælir at leggja fyri nevndina.
· Uppfylging av gjørdum íløgum.
· Søla av gjørdum íløgum.
· Fyriskipa arbei›i› á skrivstovu grunnsins.

## Persónurin

N‡ggi stjórin skal vera mi›søkin og framtakshuga›ur. Harafturat er ney›ugt, at vi›komandi dugir væl at meta um vinnuligar møguleikar. Dentur ver›ur eisini lagdur á gó›ar samskiftiseginleikar, at vi›komandi er opin og úti um seg og førur fyri at arbei›a sjálvstø›ugt.

## Førleikin

Dentur ver›ur lagdur á, at umsøkjari hevur vi›komandi, ástø›iliga útbúgving frá hægri lærustovni. Somulei›is er ta› ein fyrimunur um umsøkjari kann vísa á úrslit í verki. Eitt væl grunda› samfelagsligt og vinnuligt innlit, ver›ur rokna› sum sjálvsagdur lutur.

## Vit bjó›a

Framtaksgrunnur Føroya hevur ein sentralan leiklut í føroysku vinnuni og setti stjórin fær sjálvur høvi at menna og ávirka virksemi grunnsins komandi árini. Stjórin kemur at virka í einum spennandi og avbjó›andi umhvørvi, har birting og n‡hugsan eru gerandiskostur. Lønin ver›ur sett eftir útbúgvingum og royndum.

## Umsóknir

Umsóknir, i› ver›a vi›gjørdar í trúna›i, skulu innan 20. mars 2000, saman vi› avriti av prógvum og CV sendast til:

Framtaksgrunnur Føroya
Bøkjarabrekka 9
Postrúm 3157
110 Tórshavn

Nærri kunning um starvi› fæst vi› at venda sær til Wilhelm Petersen, nevndarformann. Tlf. arbei›i: 350 100, Heima: 310 678.

www.framtak.fo

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, i› hevur sum endamál, at gera íløgur í n‡ggj ella ví›ka› vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsikta› kapitalavkast, i› stendur mát vi› vá›an. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir vi› høgum vitanarinnihaldi. Íløgan hjá Framtaksgrunninum kann ver›a íløgd sum partapeningur ella sum ábyrgdarlán. Framtaksgrunnurin avhendar síni partabrøv tá rakstur og felag metast at hvíla á einum bur›ardyggum grundarlag.

stephanssons hús

# Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Søkt verður eftir sosial- & sunnheitsassistentum til frítíðaravloysing í tíðarskeiðnum frá 1. juni til 30. september 2000.

Løn- & setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrahjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371666 lokal 147.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

innan 22. mars 2000.

# Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Søkt verður eftir sjúkrasystrum til frítíðaravloysing í tíðarskeiðnum frá 1. juni til 30. september 2000.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371666 lokal 147.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

innan 22. mars 2000.

# Landssjúkrahúsið

FO-100 Tórshavn

## Læknaskrivari

Á Heiliráðdeildini á Landssjúkrahúsinum er eitt avloysarastarv sum læknaskrivari á fulla tíð leyst til setan frá 1. apríl 2000 til 31. august 2001.

Umsøkjarin skal hava læknaskrivaraútbúgving.

Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Jón á Steig, leiðandi yvirlækna, tlf. 313540 lok. 232.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknarfreist: 21. mars 2000, kl. 14.00.

# Suðuroyar Sjúkrahús

Søkt verður eftir frítíðaravloysing á sjúklingadeildini í tíðarskeiðnum frá 1. mai til 30. september 2000.

Setanartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Postrúm 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 21. mars 2000.

# El-lærlingur

Søkt verður eftir el-lærlingi at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Í dag starvast 6 fólk í fyritøkuni, og vit gera allar vanligar el-innleggingar, stýringar, alarmskipanir, edv-installatiónir v.m.

Um hetta hevur tín áhuga, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn.

Nærri upplýsingar fáast á telefon 213313 ella 443313.

**EL-TEKNIK Sp/f**
Telefon 443313 ella 213313, fax 443314
E-mail: elteknik@post.olivant.fo
FO-520 Leirvík



**Toll- og Skattstova Føroya,**
**Norðoya øki**

## Starv sum avloysari

### fyri starvsfólk í farloyvi á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya øki

**Avloysarastarv:**
Á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki, er avloysarastarv fyri starvsfólk í farloyvi leyst at søkja. Starvið er svarandi til fulla starvstíð frá 1. apríl 2000 og 12 mánaðir fram.

**Arbeiðsuppgávur:**
Talan er um arbeiði, ið umfatar roknskaparlíkning og útgangandi eftirlit innan toll, skatt og mvg v.m.

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal í minsta lagi hava HH og skrivstovuútbúgving, merkonom í roknskapi ella líknandi útbúgving gevur fyrimun, vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiðið til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði – kunnleiki til EDV er ein treyt – og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðnum.

**Setanarviðurskiftir:**
Løn og setanarviðurskiftir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið eftir útbúgving og starvsroyndum.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við prógvum og ummælum verða at senda til Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki, Box 16, FO 700 Klaksvík. **Umsóknirnar skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya í hendi í seinasta lagi hin 15. mars 2000.**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Norðoya øki • Box 16
Stangaskákið 1 • FO-700 Klaksvík

**Um stovnin:**
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskatta lóggávuna og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, sum eru á Tvøroyri, í Skopun, Tórshavn, Sørvági, Saltangará og í Klaksvík, røkja raksturin. Í Norðoya Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 10 1/2 fólk.

# Bilar til sølu

1 **Mercedes Benz 250**, árg. 8/94, 140.000 km, aut. gear, abs, servo-stýring, diff. sperru, el-rútar aftan, luftskiftisskipan og air bag. Sær gott út og er í sera góðum standi.

1 **Opel Vectra 2.0**, 16 vent. Turbo Diesel, árg. 97, koyrt 89.000 km, abs, servo-stýring, sentral lás við fjarstýring, 2 airbags. Er í sera góðum standi.

pf AUTO·VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
Fax 373961
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR




**HITABLÁSARI**
Sera væl egnaður til frambygdar bátar.
Verður koplað inn í kølivatnið.
Fæst 12 ella 24 volt

D.J. ENNI
TVØROYRI
Tlf. 71061

sosialurin
Alt ið fyrst við
www.sosialurin.fo

# Búskaparfrøðingur

## Landsbankin søkir eftir 2 búskaparfrøðingum

**Arbeiðsuppgávur**
Leggja til rættis hagtøl og frágreiðingar um búskap og fíggjarviðurskifti og at arbeiða við menningaruppgávum viðvíkjandi føroyska kredit- og kapitalmarknaðinum.

Aðrar uppgávur snúgva seg um kredittmetingar fyri/av stovnum og myndugleikum, menning av búskaparmodelli og útbygging av hagtalsskipanum um kredittmarknaðin og gjaldførið í landinum.

Arbeiðið er býtt í ábyrgdarøki, men stovnurin er lítil og uppgávurnar stórar. Tí verður nógv arbeiði gjørt í felag, eins og tað er skiftandi.

**Førleiki**
Tann eini persónurin skal hava førleika til at arbeiða við tjóðarbúskapi. Hugsað verður um útbúgving sum cand.polit, cand.oecon, cand.merc.dat ella líknandi.

Hin skal hava førleika til at arbeiða við og kanna roknskapir. Hugsað verður um útbúgving sum HA, HD ella líknandi.

Tað er í báðum førum ein fyrimunur við góðari útbúgving. Hinvegin kunnu góðar arbeiðsroyndir eisini viga upp ímóti tí.

**Løn**
Eftir avtalu við støði í sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Tíðarfreist o.a.**
Vit hava brúk fyri fólki rættiliga skjótt, men hava eisini áhuga fyri seinni setanartíð, um talan er um fólk við røttu royndunum.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra (sigurd@landsbank.fo) ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra (jem@landsbank.fo) um fleiri upplýsingar á tlf. 318305.

Eingin tíðarfreist er í fyrsta umfari sett, men verða fleiri fyrispurningar verður tíðarfreist sett á. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og størv sendast landsbankanum:

**Landsbanki Føroya**
Müllers Hús • Gongin
Postrúm 229 • FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

*Landsbanki Føroya er bankasamband landskassans. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.*

*Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo*

# DANSISKEIÐ FYRI BØRN OG UNG



***Um nóg nógv tekna seg verður dansiskeið í enskum dansi í aulini í Hoydølum vikuskifti 10.-11. mars 2000***

*Undirvíst verður í dansi s.s. Fox-Trot, Quick-Step og Rock'n roll. Undirvísari er Anna Kirstin av Tvøroyri.*

***Dansað verður í 3 holdum***
*Hold 1: Børn 7 til 9 ár*
*Hold 2: Børn 10 til 13 ár*
*Hold 3: Ungdómslið*

***Kostnaður** fyri skeiðið: kr. 100,-*
***Tilmelding** fer fram á tel.*
*316063 - 316682 - 310634*
*317243 - 314486*

Sosialurin - 311820

Dansifrøi